# Kjak



**Eyðgunn Samuelsen**
*forkvinna í tingbólki Javnaðarfloksins*

## Búskaparráðið rópar varskó

*Nýggjasta frágreiðingin viðger nøkur sera viðkomandi samfelags viðurskifti , nevniliga skeivu gongdina í okkara høvuðsvinnu, bæði á sjógvi og landi*

Staðfest verður m.a tann veruleiki, at heimliga fiskivinnan hevur havt vánaligan rakstur í fleiri ár. Feskfiskaveiðan eftir botnfiski hevur stórt sæð ikki givið avlop síðan 2002, og fiskatilvirking hevur, sæð undir einum, ikki givið avlop síðan 2001.Veiðitrýstið undir Føroyum seinastu 15 árini hevur verið alt ov høgt, og fiskivinnan verður ikki stýrd burðardygt.

### Politiska skipanin má vakna

Tað hevur í alt ov nógv ár verið ein trekleiki og eitt afturhaldni í politisku skipanini til at taka hond um hesar trupulleikar. Avleiðingin er tann, at vit als ikki fáa tann búskaparvøkstur, ið okkara tilfeingi eigur at geva okkum. Næsta avleiðingin er, at vit í veruleikanum mugu velja, um vit framhaldandi skulu skerja almennu vælferðartænasturnar, ella vit taka okkum saman og fremja neyðugu broytingarnar, so okkara høvuðsvinna kemur at geva tað avkast og tann búskparavøkstur, ið hon kundi gjørt, um vit bera okkum rætt at.

### Óheftan stovn at regulera fiskiveiðina undir Føroyum er eitt av tilmælunum

Javnaðarflokkurin hevur í fleiri ár mælt frá, at politiska skipanin rekur vinnu, tí hetta viðførir, at alt ov stórt trýst verður lagt á politisku skipanina, og møguleikin fyri at fiskidagar verða tillutaðir ymsu bólkunum útfrá øðrum atlitum, enn hvat tænir samfelagnum og vinnuni best. Vit eru tískil púra samd við hesum tilmæli.

### Uppboð ella tilfeingisgjald

Sambært galdandi lóg um vinnuligan fiskiskap skal nýggj skipan setast í verk í 2018. Vinnan førir alsamt fram, at henni tørvar tryggar karmar fleiri ár fram í tíðina fyri at kunna virka optimalt. Tí er tað ein gyltur møguleiki, longu nú, at royna aðrar skipannir, so politiska skipanin hevur nakrar ítøkiligar royndir at laga nýggju skipanina eftir. Javnaðarflokkurin metir, at ein gyltur møguleiki er at royna eitt slag av tilfeingisgjaldi við, í hvussu so er einum parti av makrelkvotuni, ið nú ferð at verða útlutað. Tað kann ikki verða rætt, hvørki fyri vinnu ella samfelag, at ein politikari kann býta hesi rættindi út.

### Búskaparliga avbjóðingin

Løgtingið hevur samtykt, at hallið á fíggjarlógini skal verða burtur í 2015. Dentur varð lagdur á, at hetta skuldi fremjast uttan at knúsa vælferðartænasturnar, tvørturímóti. Leiðin, ið tingið vísti á, var at gera nakað við bygnaðarliga hallið og at skapa fortreytir fyri búskaparvøkstri. Sambært fleiri og nú eisini Búskaparráðnum er fortreytin fyri búskparvøkstri, at tillagingar verða gjørdar í okkara fiskivinnu. Valið er sostatt einfalt. Lata vit standa til í vinnuni mugu vit niðurbroyta vælferðartænasturnar, ella vit gera neyðugu tillagingarnar, so vit kunnu varðveita vælferðina. Javnaðarflokkurin vil varðveita vælferðina, og tískil vil flokkurin verða við til, at fremja neyðugar tillagingar av okkara vinnu til frama fyri, bæði vinnuna sjálva og tað fólk, ið her býr.

---



**Høgni Hoydal**

## Almennur spurningur til TF-Holding og nýggju leiðsluna í EIK

*Fyrst av øllum fari eg at ynskja tykkum í TF-Holding góða eydnu við nýggja leiklutinum sum høvuðseigari í EIK-banka*

Havi heft meg við, at bæði tá tit fyrstu ferð bjóðaðu tykkum fram at seta pening í Eik, og nú tit eru vorðin høvuðseigarar, hava legt dent á hetta: At tit vilja vera ein peningastovnur og eitt samtak, sum fyrs og fremst skal menna føroyska samfelagið, vinnulívið og førleikarnar í hesum landi.

Áður enn tit tóku við, fluttu føroysku peningastovnarnir allar sínar elektronisku skipanir av landinum og harvið allar upplýsingar og alt infrakervið fyri peningaviðurskiftini hjá øllum føroyskum borgarum.

Fýra ferðir síðani 2003 hava vit í Tjóðveldi lagt lógaruppskot fyri tingið, sum skal tryggja, at hetta grundleggjandi infrakervið, upplýsingarnir og førleikarnir at menna skipanirnar, kunnu framhaldandi byggjast í Føroyum. Hvørja ferð er uppskotið felt og peningastovnarnir hava arbeitt hart ímóti tí.

Nú vit aftur hava uppskot á tingi, sum á ein lagaligan hátt skjýtur upp, at peningastovnarnir fáa 3-5 ár at byggja upp og menna skipanirnar aftur í Føroyum, kunnu vit sláa fast:

- At sjálv flytingin hevur kostað væl omanfyri 100 mió. kr.
- Kostnaðurin hjá fyritøkum og peningastovnunum sjálvum í eyka arbeiðstímum av umleggingini og tøkniligum trupulleikum, er ikki upplýstur, men telur nógvar 10-tals milliónir.
- Tað almenna skal brúka millum 25 og 50 mió. kr. at leggja sínar skipanir um til tess at skatta- og avgjaldsinnkrevjing skal rigga frameftir.
- Og kostnaðurin, ið peningastovnarnir skulu rinda fyri at vera partur av Skandinavisk Data Central (SDC), er um 50 mió. kr. um árið.

Bara fyri hesar ovurstóru upphæddir, ið longu eru nýttar, kundu vit havt bygt upp og ment skipanir í Føroyum, ið høvdu kunnað verið kappingarførar og bjóðað tænastur fram bæði her og aðrastaðni. Og fyri 50 mió. um árið, ið vit nú sum bankakundar gjalda til at menna eina avoldaða skipan í Danmark, kundi ein føroysk KT-vinna ment týdningarmiklar førleikar.

Higartil hava vit við flytingini bert fingið:

- Eina munandi verri tænasta til borgarar og vinnulív,
- stórar eykarokningar til brúkaran, vinnuna og tað almenna;
- niðurlaging av einum virkandi infrakervi, har tað frameftir verður munandi truplari og dýrari at sameina almennar og privatar skipanir;
- skerdar møguleikar hjá føroyska samfelagnum at standa seg í kappingini um at draga fólk til sín, heldur enn at enda sum útjaðarasamfelag.

Spurningur min til TF-Holding og nýggju EIK-leiðsluna er tískil: Taka tit undir við, at vit næstu 3-5 árini fara at byggja skipanir upp aftur í Føroyum til elektroniska infrakervið hjá peningastovnunum, sum kann menna føroyskar førleikar og samfelagið alt?